Privatiserings-sóttin eisini rakt Føroyar

– Tað er neyðugt, at Verkamannafylkingin medvirkar til at verkafólkið verður skúlað til at kenna mun á vini og fígginda og støðugt minna á gerðir og lyfti hjá Tjóðveldis- og Javnaðarflokkinum, sigur Verkamannafylkingin m. a. í yvirlýsing frá landsfundinum um vikuskiftið

Eirikur Lindenskov

– Tað eru tey, ið meina, at Verkamannafylkingin hevði sitt »berættigilsi« tá hon varð stovnað, og at hon nú hevur tænt sínum endmáli, staðfestir Verkamannafylkingin í yvirlýsing, sum er send fjølmiðlunum aftan á landsfundin í vikuskiftinum.

– T. v. s., at hesi fólk meina, at nú stendur væl til, og at kosin hjá Tjóðveldis- og Javnaðarflokkinum tænir arbeiðandi fólkinum. Royndirnar sýna okkum tó, at hesir flokkar hamskiftast, tá teir fáa stjórnarvaldið, sigur fylkingin, sum eisini staðfestir, at dømi um hetta eru óteljandi.

– Tí er neyðugt, at Verkamannafylkingin medvirkar til, at verkafólkið verður skúlað til at kenna mun á vini og fígginda, og støðugt minni á givin lyfti og gjørdar gerðir. Og ikki minst leggur itøkilig uppskot fram, sum betra tilveruna hjá meiniga fólkinum.

Landsfundurin hjá Verkamannafylkingini ásannar at rættartrygdin, ið stóð rættuliga frammaliga í seinasta valstríð, framvegis ikki er komin upp á pláss. Semja varð gjørd um, at setast skuldi ein løgtinsins umboðsmaður, og hevur hesin verið á fíggjarlógini síðani, men er framvegis ikki settur. Privatiserings-sóttin hevur eisini rakt Føroyar. Telefonverkið, Postverkið, Strandferðslan, já sjálvt jørðin, ið skal geva okkum føði, skal gevast spekulantum at umsita.

– Verkamannafylkingin hevur ta avgjørdu støðu, at Føroya Banki skal ikki undir nøkrum umstøðum aftur á privatar hendur.

Fylkingin sigur eisini, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark hava prógvað, at broytingar eru neyðugar sum skjótast. Bankamálið má tó ikki gera, at vit gloyma okkara egna leiklut og okkara egnu spekulantar. Tí ásannast má, at tá ið onkur missir pengar, er altíð onkur annar, ið fær teir, sigur Verkamannafylkingin í yvirlýsingini, sum er dagfest 14. mars og undirskrivað av formanni fylkingarinnar, Luitjeni Apol, sum er nýggi formaður í Verkamannafylkingini eftir at Alis Jacobsen ikki ynskti at taka við afturvali.

Hinir limirnir í starvsnevndini eru Kári Jacobsen í Vági, sum er næstformaður og Arnbjørn í Smiðjuni.



Luitjen Apol, formaður í Verkamannafylkingini er eisini tann nýggjasti fyrrverandi løgtingsmaðurin
Mynd: Jens Kristian Vang

Oljufeløg kasta saman

um at verja umhvørvið við Føroyar

Eini 23 oljufeløg hava, eftir áheitan frá Oljufyrisitingini (OFS), undirskrivað eina avtalu um at fara undir eina umfatandi umhvørvisverkætlan, við tí endamáli at staðfesta tað føroyska havumhvørvi. Verkætlanin er ein liður í fyrireikingunum hjá feløgunum, áðrenn fyrsta loyvisrundan verður hildin fyri føroyskt øki.

Verkætlanin, sum hevur fingið navnið GEM, hevur til endamáls at savna upplýsingar og kanna økið um Føroyar, úr frá einum geotekniskum, umhvørvisligum veður og hav sjónarmiði. Meðan hesin multifelags samarbeiðsháttur alt meira verður vanligur arbeiðsháttur, er hetta fyrstu ferð feløg hava kastað saman, áðrenn ein loyvisrunda hevur verið hildin.



GEM-verkætlanin verður fyriskipað av einum stýringsbólki, við harra Halvor Snarvold sum formanni, og trimum undirarbeiðsbólkum. **Geotekniski bólkurin** skal kanna fysisku viðurskiftini á havbotninum og beint undir vatnskorpuni. **Umhvørvisbólkurin** skal kanna djóra- og plantulívið í og kring Atlantshavið um Føroyar. **Metocean bólkurin** skal savna og samanbera upplýsingar um havið kring alt hetta økið. Allir triggir bólkar skulu bæði nýta verandi tilfar og kanningar og fyriskipa nýggjar verkætlanir. Høvuðsendamálið verður at fáa til vega økisupplýsingar til viðkomandi feløg, sum so kunnu skoyta úrslit av nágreiniligum staðarbundnum kanningum uppí, soleiðis at fullfíggjaðar umhvørvisligar- og trygdarmetingar kunnu gerast, áðrenn boringarvirksemið byrjar.

Viðvíkjandi nyttuna av GEM verkætlanini segði harra Halvor Snarvold

»Hendan umfatandi økis verkætlan sigur nakað um, hvussu bundin øll tey luttakandi oljufeløgini meta seg vera at tryggja, at allir umhvørvisligir spurningar verða tiknir við so tíðliga sum til ber. Tað undirstrikar eisini týdningin, sum oljufeløgini leggja í at verja havumhvørvið, tá tey byrja at leita í hesum nýggja økinum«.

Virksemið hjá GEM, tær einstøku kanningarverkætlanirnar og øll data, ið verða fingin tilvega, verða umsitin av tí føroysku fyritøkuni Atlanticon, sum heldur til í Tórshavn.

Feløgini, sum luttaka í GEM eru Agip, Amerada Hess, Amoco, Elf, Enterprise, Esso, Murphy Eastern, Norsk Hydro, Phillips, Arco, BP, Conoco, Deminex, DONG, Fina, Lasmo, Maersk, Marathon, Mobil, Saga, Shell, Statoil, Texaco.

Oljufyrisitingin og Fiskirannsóknarstovan eru eisini umboðað í stýringsbólkinum.

Atlanticon skal umsita umhvørvisverkætlan

Atlanticon skal umsita GEM-verkætlanina, sum er lýst í aðrari grein í blaðnum. GEM-verkætlanin er ein av heimsins mest umfatandi umhvørvisverkætlanum nakrantíð. Verkætlanin er sett í verk av 23 oljufeløgum, sum vilja hava umhvørvið kannað, áðrenn veruligt oljuleitingarvirksemi fer í gongd við Føroyar.

Fyri at tryggja best møguligt samband millum oljufeløgini, føroyskar stovnar og føroyskt vinnulív, er dagliga umsitingin av GEM-verkætlanunum løgd í Tórshavn hjá felagnum Atlanticon, sum verður miðdepulin fyri hesum samstarvinum. At umsitingin er løgd í Føroyum, gevur føroyskum fyritøkum og stovnum góðar møguleikar fyri at fáa kunnleika til tær ymisku verkætlanirnar, og hvørji krøv verða sett til útvegarar. Hetta fer uttan iva at fáa stóran týdning fyri føroyskari luttøku í verkætlanunum, sum verða bodnar út.

Atlanticon er eitt smápartafelag, ið føroysk vinnufeløg og Føroya Landsstýri eiga. Tað at vinnan og tað almenna eiga felagið ger, at Atlanticon hevur gott innlit í vinnuna og almennar stovnar. Hetta saman við virkseminum, ið Atlanticon hevur fingist við eru týðandi orsøkir til, at Atlanticon hevur átikið sær hesa uppgávuna.

Atlanticon, fyrr nevnd Faroe Fish Consult, varð stovnað í 1993 og arbeiðir við ráðgevandi virksemi. Felagið arbeiðir m.a. við innaneftirliti og góðskustýring. Atlanticon hevur eisini verið við til at gjørt fleiri almennar frágreiðingar. Av hesum kunnu nevnast »En sammenligning af levevilkår på Færøerne og i Danmark« (1955), »Kortlegging av tí føroyska útvegarakervinum« (1996) og »Faroe Islands Business Environment« (1997).

Hjá Atlanticon fara tvey fólk at arbeiða við umsitingini av GEM-verkætlanunum. Ein samskipari skal byrja 1. apríl, og Atlanticon søkir nú í bløðunum eftir einum skrivara.

Lesið Sosialin
á Internetinum
www.sosialurin.fo